Ellindur Egilstrøð, Gallup-Føroyar:

# – Vit skulu tryggja at spurnarkanningar eru rættvísar

GALLUP-SPURNARKANNING
*Páll Holm Johannesen*

Eftir, at Vinnuhúsið almannakunngjørdi úrslitið av spurnarkanningini, hava fleiri havt á málið, at talan er um bílagt arbeiði frá Vinnuhúsinum, sum skal nýtast til í herferð ímóti arbeiðarafeløgunum. Stovnurin, ið hevur latið kanningina um arbeiðsmarknaðinum úr hondum er Gallup-Føroyar. Stjórin, Ellindur Egilstrøð, leggur dent á, at stovnurin aldrin ger viðmerkingar til úrslitið av slíkum kanningum.

– Vit verða biðin at gera kanningar fyri nógvar ymiskar stovnar, og tað einasta, vit skulu tryggja okkum er, at spurnarkanningarnar eru rættvísar, og síðan avger stovnurin, ið eigur kanningina, hvat hann vil gera við hana, greiðir Ellindur frá.

### 500 fólk er nóg mikið

Vanliga verður mett, at um 1000 fólk eiga at verða spurd, um spurnarkanningar skulu verða umboðandi fyri øll. Tað er ein matematiskur frymil, ið hevur funnið fram til at júst 1000 er rætta talið.

Til kanningarnar hjá Gallup-Føroyum verða vanliga bert góð 500 fólk spurd, og tí kann spurningur setast við, um kanningar hjá stovninum eru umboðandi – og harvið geva rættvísa mynd av. hvat fólk halda um eitt ávíst evnið.

Til tann spurningin svarar Ellindur Egilstrøð, at munurin millum at spyrja 500 og 1000 fólk ikki er so stórur, og tí hevur stovnurin valt eina fasta mannagongd við at spyrja 500 fólk til hvørja kanning, tí verður mett, at 500 er nóg mikið.

### Leiðandi spurningar

Til kanningina hjá Vinnuhúsið kunnu spurningar setast við, um allir spurningar kunnu sigast at verða objektivir. Einstakir spurningar, sum: »um fólk ynskja broytingar á arbeiðsmarknaðinum, so vit ikki koma í somu støðu aftur við longum verkfalli«, kunnu eftir fimm vikur í verkfalli tykjast leiðandi. Flestu fólk vóru rættiliga troytt av drúgva verkfallinum, og tískil er svarið hjá flestum føroyingum givið frammanundan.

– Kanningin fyri Vinnuhúsið viðger eina djúpa konflikt millum tveir partar, sum júst høvdu verið í verkfalli, og allir spurningar kunnu diskuterast um teir eru leiðandi, og tað er upp til einstaklingin at avgera, um júst hasin spurningurin er leiðandi, svarar Ellindur Egilstrøð fyri Gallup-Føroyar.

Hann leggur annars dent á Gallup-Føroyar hevur sum uppgávu at tryggja at allir spurningar eru neutralir. Vanliga mannagongd er, at stovnurin, ið ynskir kanningina kemur við einum uppleggi um spurningar, har Gallup síðan formulerar endaligu spurningar, greiðir Ellindur Egilstrøð.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum:

# – Kanningin er eitt gott amboð fyri báðar partar

**Stjórin í Vinnuhúsini letur bæði væl og illa at kanningini hjá Gallup. Hann hevði ikki væntað, at so nógv tóku undir við verkfallinum í vár. Jan Mortensen fegnast tó um, at føroyingar ynskja broytingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum**

GALLUP-SPURNARKANNING
*Páll Holm Johannesen*



*Jan Mortensen, Stjórin í Vinnuhúsinum, sigur seg verða bæði positivt og negativt yvirraskaðan av kanningini hjá Gallup*

*Savnsmynd*

Stjórin í Vinnuhúsinum er sera fegin um, at spurnarkanningin um føroyska arbeiðsmarknaðin endaliga er almannakunngjørt. Spurdur, um tað er av tilvild, at kanningin júst kemur nú Vinnumálaráðið júst hevur lagt uppskot fram til hoyringar hjá feløgunum á arbeiðsmarknaðinum, svarar Jan Mortensen, at har er eingin samanhangur.

– Vit gjørdu kanningina í juni mánað, og síðan hevur verið summarfrítíð, og tískil hevur úrslitið ikki kunnað verið almannakunngjørt fyrr enn nú, svarar stjórin í Vinnuhúsinum.

Til spurningin, um tað ikki kann tykjast heldur løgið, at ein av høvuðspørtunum í stríðnum á føroyska arbeiðsmarknaðinum letur gera ein kanning um eina støðu, har parturin sjálvur er innblandaður, svarar Jan, at tá fakfeløgini ikki vilja kanna, hvørja støðu teirra limir hava til verkfalli, mugu arbeiðsgevararnar royna.

### Vildu hava greitt svar

Orsøkin til, at Vinnuhúsið vildi hava eina spurnarkanning var, at stovnurin, undir verkfallinum í vár, ferð eftir ferð hoyrdu frá virkisleiðarum kring landið, at teirra arbeiðararnir ikki tóku undir við verkfallinum. Fyri at fáa fulla greiðu á um so var statt varð neyðugt við einari spurnarkanning, har verkafólki kundu svara anonymt.

– Úrslitið av kanningini er eitt gott amboð fyri báðar partar, tí vit hava lyndi til at byrgja okkum inni í okkara fýrkantaðu verð, og kanningin kann við til at seta tingini í øðrvísi perspektiv, greiðir Jan Mortensen

### Yvirraskaður

Jan Mortensen varð ikki sørt yvirraskaður av nøkrum av úrslitinum í kanningini. Sjálvur hevði hann ikki væntað, at so stórur partur tók undir við verkfallinum (helmingurin tók undir við verkfallinum, blðm.). Hinvegin fegnast hann um, at so stórur partur av føroyingum ynskja broytingar á arbeiðsmarknaðinum, so hann var bæði postivt og negativt yvirraskaður, sum hann málber seg.

Ingeborg Vinther:

# -Arbeiðsgevararnir eru farnir ov langt

**Gallup-kanningin hjá Vinnuhúsinum er gjørd fyri at trumfa arbeiðsrættin ígjøgnum saman við politiska myndugleikanum, sigur Ingeborg Vinther**

GALLUP-SPURNARKANNING
*Páll Holm Johannesen*



*– Nú eru arbeiðsgevararnir farnir ov langt. Tað er ikki teirra uppgáva at gera kanning um okkara limir*

*Savnsmynd*

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, gevur ilt av sær, nú kanningin hjá Vinnuhúsinum er almannakunngjørd.
– Tað er als ikki uppgávan hjá arbeiðsgevarunum at gera spurnarkanning um okkara limir. Teir kenna eingi mørk fyri, hvussu langt teir kunnu fara, og haldi hatta er rættiliga frekt gjørt, sigur Ingeborg Vinther.

### Arbeiðsrætturin trumfast ígjøgnum

Hon heldur eisini, at øll hava gloymt arbeiðsgevararnar, sum eisini vóru ein partur í verkfallinum í vár, og leggja alla skuldina fyri verkfallið á fakfeløgini. Ingeborg er ikki í iva um, at Gallup-kanningin skal nýtast til trumfa arbeiðsrættin ígjøgnum, sum hon málber seg.

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag er ikki í iva um, at meiningin við kanningin hjá Vinnuhúsinum er at hjálpa politiska myndugleikanum við at løggeva fyri einum føstum gerðarrætti í Føroyum.

### Fólk kenna ikki avleiðingarnar

Ein meiriluti av føroyingum ganga inn fyri, at ein serligur rættur verður settur á stovn, sum skal taka sær av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum. Spurd um hvussu hon fatar ta støðuna, nú hon arbeiðir so hart fyri, at eingin fastur gerðarrættur skal verða settur á stovn frá politiskari síðu, svarar Ingeborg, at fólk ikki kenna avleiðingarnar av einum arbeiðsrætti, og tískil vita tey ikki, hvat tey hava svarað.

– Høvdu fólk vita, at ein arbeiðsrættur hevur við sær, at stórur partur av verkfalsrættinum verður skerdur, høvdu avgjørt svara øðrvísi, sigur Ingeborg Vinther at enda.



# Føroyingar ynskja ein serligan rætt

**Ein meiriluti av føroyingum ynskja ein serligan rætt, ið kann skjótt og greitt taka sær av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum. Á floksbýtinum gongur týðuliga fram, at fólkafloksveljarar eru heitast fyri, at ein serligur rættur verður settur á stovn**

GALLUP-SPURNARKANNING
*Páll Holm Johannesen*

Seinnapartin týsdagin kunngjørdi Vinnuhúsið eina spurnarkanning, ið Gallup-Føroyar hevur latið gjørt. Í døgunum 16. til 22. juni vórðu 522 fólk spurd um, hvørja støðu tey høvdu um støðuna á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Í kjalarvørrinum av uppskotinum hjá Vinnumálaráðnum um ein arbeiðsrætt ella ein fastan gerðarrætt, sum hann verður kallaður í Føroyum, røkist fyri, at ein meiriluti av føroyingum taka undir við einum serligum rætti, ið skjótt kann taka avgerðir um ivamál í sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum.

### Størsti meiriluti í Fólkaflokkinum

Í alt siga 60 % av teimum spurdu, at tey eru samd í, at ein serligur rættur verður settur á stovn. 21% av teimum spurdu eru ósamd, meðan 19% siga seg ikki vita.

Spurningurin um at seta ein rætt at taka sær av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum hevur leingi verið umrøddur sum eitt stríð millum fakfeløgini og arbeiðsgevararnar

Verður nærri hugt at floksbýtinum, eru tað serliga fólkafloksveljarar, ið eru heitast fyri serliga rættinum. Heili 77% taka undir við honum. Í hinum trimum stóru flokkunum er eisini meiriluti millum veljararnar fyri einum serligum rætti, men munurin á teimum, ið eru samd og ósamd er væl minni enn hjá fólkaflokkinum.

Hetta býtið er ikki óvæntað, tí kanska serliga hava báðir teir vinstrahallu flokkarnar, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin ígjøgnum tíðina havt ein sermerkt samband við føroysku fakfelagsrørsluna.

Søguliga sæð hava báðir flokkarnir hava verið málgagn hjá ávísum fakfeløgum, og hóast sambandið millum flokkarnar og fakfeløgini hevur verið minkandi seinnu árini, so kemur tað valla óvart á nakran, at veljarar hjá hesum flokkum eru varnari fyri at seta ein rætt á stovn.

Á sama hátt hava vit ikki havt nakran flokk, ið sermerkt hevur havt samband við arbeiðsgevarasíðuna, men ein fer neyvan heilt av leið, um ein nevnir Sambandsflokkin og kanska serliga Fólkaflokkin sum søguliga báðir hava talað arbeiðsgevaranna søk.

Hvussu er og ikki við floksbýtinum, so er gongur fram við Gallup-kanningini hjá Vinnuhúsinum, at ein meiriluti av føroyska fólkinum ynskir ein serligan rætt settan á stovn.

Í løtuni er stríðið um tað skal lóggevast ella um feløgini á arbeiðsmarknaðinum sjálvi skulu koma til sættis um ein fastan gerðarrætt. Hóast tann spurningurin ikki framgongur í kanningini, so kundi verði áhugavert at fingið at vita, hvørja áskoðan fólk høvdu til júst tann spurningin.










# Vit hava ov nógv verkføll !

**Nærum níggju av tíggju føroyingum eru samdir í, at ov nógvar trætur eru á føroyska arbeiðsmarknaðinum**

GALLUP-SPURNARKANNING
*Páll Holm Johannesen*

Tað er eingin ivi millum føroyingar, eftir drúgva verkfallið í vár, at vit hava alt ov nógv verkføll og trætur á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Nærum níggju av tíggju føroyingum eru antin púra samd, samd ella nærri samd í, at træturnar á arbeiðsmarknaðinum í Føroyum eru ov nógvar.

### Fólkið stuðlar arbeiðsgevarum

Í Sosialinum fyrr í vikuni førdi forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, fram í samband við nýggja uppskotið hjá Vinnumálaránum, at hon helt ikki, at føroyingar høvdu fleiri verkføll enn onnur lond.

Eftir útalilsini hjá Ingeborg, gav umboðið fyri arbeiðsgevararnar, Jan Mortensen, ilt av sær, og skýrdi forkvinnuna í Føroya Arbeiðarafelag at bera fram ósannindi. Hann vísti á, at fakta vísir, at Føroyar eru eitt land við nógvum verkføllum.

Uttan at taka dagar ímillum, hvør hevur rætt, so vísir kanningin, ið Vinnuhúsið hevur latið gjørt, at føroyingar halda, tað eru ov nógvar trætur á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

## Rætting

Undirritaði hevði í gjár ein grein um Búa Dam, ið seinasta hálva árið hevur verið á Kuba. Onkrar misskiljing er í greinini. Nakað nógv er gjørt av í setninginum um, at føroysk konufólk eru afturlatin seksuelt orsaka av kristnidóminum. Høvuðspersónurin meinti, at føroyingar sum heild kunnu tykjast heldur afturlatnir í teirra rørslum, sammett við kubanar, og tað lá partvís var okkara fatan av kristnidóminum. Útalilsini kunnu fatast sum ein háan ímóti føroyskum konufólkum, og tað er als ikki tað, sum liggur í tí. Vit biðja orsaka um mistakið

**-páll**